MIÐVIKAN

# Kanna djóralív við oljustøðir

OLJA OG UMHVØRVI
*Jan Müller*

Nú um dagarnar var sera framkomna oljuskipið Gramphian Frontier á Havnini fyri at skifta manning og bunkra. Skipið røkir vaktar- og bjargingartænastuna kring Foinaven oljufeltið skamt frá føroyska markinum. Ein partur av uppgávuni hjá manningini umborð er at stuðla vísindafólki, havfrøðingum og fiskifrøðingum frá lærdum háskúlum í Bretlandi at kanna djóra- og plantulívið í havinum, har oljan kemur upp.

Endamálið við kanningunum er at geva vísindafólki nýggjar upplýsingar, soleiðis at man betur skilur hetta annars lítið kannaða umhvørvið. Ein av orsøkunum til, at nettupp Grampian Frontier er so upplagdur til slíkar kanningar er tann, at skipið hevur ein sera framkomnan minikavbát, ”Remotely operated vehicle, ROV”, ið er ætlaður til at kanna og bøta um útbúnaðin á havbotninum, har oljan kemur upp.

Við hesum farinum, sum verður stýrt av brúnni á oljuskipinum, kunnu vísindafólkini útvega sær hópin av upplýsingum frá umhvørvinum rundan um oljuútbúnaðin á umleið 600 metra dýpi. Data og upplýsingarnir, sum fáast til vega frá hesum kanningum, eru bæði vanliga fotomyndir, video og prøvar, verða so viðgjørt á lærdu háskúlunum. Fyri at manningarnar á oljuskipunum, sum dagliga arbeiða í hesum umhvørvinum, skulu fáa innlit í úrslitið av hesum kanningum, verður gjørt eitt sokallað ”Deep Water Bio-Atlas”.

Tað er greitt, at slíkir upplýsingar hava eisini áhuga fyri føroyskar fiskifrøðingar og teyt fólk, sum arbeiða við leiting og seinni helt eisini framleiðslu, ikki minst nú grundarlag verður lagt undir eini møguligari oljuframleiðslu á okkara egna landgrunni. Tá er gott at kunna fáa neyvar upplýsingar frá grannnunum bæði um djóralívið og um, hvussu vit varðveita eitt reint umhvørvi. (Keldur Andy Waring, Grampian Frontier og ”Horizon” tíðarrit hjá BP).



*Framúrgóðar upptøkur á havbotni kring oljufeltið Foinaven skamt frá føroyska markinum. Vit síggja ein stóra havtasku fáa sær ein góðan gloypibita, ein tosk. Á hini myndini síggja vit tosk, sum vísir tí fremmanda farinum serstakan áhuga*

*Myndir: Horizon, nov. 2002*

Ferðandi oljustjórin:

# Statoil framvegis stóran áhuga

**Hóast fyrri brunnurin var eitt vónbrot, hevur Statoil kortini ikki mist áhugan fyri Føroyaøkinum. Arbeitt verður miðvíst við at kanna økið nærri og skal felagið skjótt taka støðu til, hvat tað ætlar við sínum 9 ára loyvi eisini**

OLJULEITING
*Jan Müller*

Eitt av feløgunum, sum framvegis hevur stóran áhuga fyri at leita eftir olju og gassi í Føroyum er norska Statoil. Maðurin, sum stendur aftanfyri hetta arbeiðið er Rúni Hansen, sum herfyri fekk litið upp í hendi ein týðandi leiklut í Statoil. Øll leiting hjá Statoil, ein partur av Noregi tó ikki íroknaður, er savnað í eina deild, Global Exploration, sum síðani er býtt í økini:

Amerika, Afrika, Caspian/Russia, Miðeystur, New Opportunities (Nýggir møguleikar) og Europe.

Rúni Hansen stendur á odda fyri Europaøkinum sum Business & Planning Manager. Hini í leiðslubólkinum eru flest jarðfrøðingar av útbúgving, so uppgávan hjá Rúna er økonomiski/handilsligi og planleggingarligi parturin. Herundir m.a. samráðingar við onnur feløg, og tey eru nógv í dag, tí tað er javnan, at tað eru tillagingar í ognarpørtum av feltum og umbýtan/søla/keyp. Alt hetta krevur nógva planlegging og arbeiði annars, áðrenn sjálvar samráðingarnar fara í gongd, og nógv fólk eru innblandaði - bæði búskaparfrøðingar, jarðfrøðingar og onnur. Tað er tiltikið nógvir fakbólkar innan oljuøkið, og ein niðurkóking av einum stórarbeiði til eina reglu-úrslit, sum Rúni málber seg, krevur altíð eitt miðvíst og stórt arbeiði.

Ein stórur partur av hesum arbeiði liggur í Stavanger, tí høvuðsskrivstovan er har, men London er eisini ein týðandi partur, tí Statoil er sera virkið í bæði Írlandi, vestan fyri Hetland og á bretska landgrunninum, og tað mesta av hesum virkseminum gongur út frá London greiðir Rúni Hansen frá, tá vit sessast í rúmligu og stórlignu hølunum hjá Statoil í London. Rúni hevur nógv um at vera og ferðast hann nógv millum tey trý arbeiðsplássini í Havn, Stavanger og London.

Sjálvt um eingin boring er í eygsjón júst í løtuni, er virksemi ikki so lítið við Føroyaøkinum. Rímuliga nógv fólk eru knýtt at projektinum. Statoil hevur tvey øki, á tí eina hava tey ein brunn eftir at bora. Meira seismikkur varð skotin síðsta ár til tess at finna eitt gott og prospektivt øki at seta borin í næstu ferð. Umframt tað hava tey teir brunnarnar, ið eru boraðir



*Rúni Hansen er helst ein tann føroyingur, sum situr ovast í stórum útlendskum oljufelag. Hetta setur eisini stór krøv til dugnaskap og yvirlit og ikki minst ferðing. Skrivstova hansara er bæði í Havn, Stavanger og í London. Her er hann á veg til arbeiðis í Statoilhúsinum í Regentstreet, hjartanum á London*

*Mynd Jan Müller*

at halda seg til. Rúni Hansen vónar, at alt

hetta saman kann gera, at tey koma at kenna økið betri, soleiðis at okkurt kann spyrjast burturúr næstu ferð - tó at váðin er stórur í økinum. Avgerð skal so eisini takast fyri nýggjuáraloyvunum nú – tað gongur út 17. august í ár. Hesi loyvi liggja á basaltøki, so her er nóg mikið at takast við í løtuni, áðrenn avgerð verður tikin, hvat gerast skal víðari sigur Rúni Hansen.



# Deyðilig luftdálking

**Tubbaksroyking er stórsta umhvørvisdálkingargølan í heimssøguni**

**Heðin Thomsen**
*Yvirlækni*

Tað er menniskjaligt at søkja tryggleika og at royna at burturbeina allar hóttanir móti sínari vælferð og lívskvaliteti. Flest øll eru frá barnsbeini von við at hugsa um reinføri sum ein nátúrligan hátt at fyribyrgja sjúkum og harvið verja lív og heilsu. Øll vilja sum eina sjálvfylgju hava eitt reint umhvørvi, reinan mat og reina luft. Tað er blivið til eina politiska grøna bylgju, sum nú eisini slær ígjøgnum her hjá okkum. Fjølmiðlarnir hava seinastu vikurnar verið nógv upptiknir av at "avdúka" eina dálkingargølu fyri og aðra eftir. Fólk harmast. Tað mest aktuella er, at føroyingar lata CO2 í stórum mongdum út í atmosferuna. Umhvørvistilvitaði fólk krevja at landstýrismaðurin ger okkurt beinanvegin (fleiri av teimum roykjarar). Onkur helt enntá, at hann eigur at verða koyrdur frá.


*Heðin Thomsen*

### Nógv verður granskað og nógv verður gjørt fyri at tryggja reinføri

Vit hava eina heilsufrøðiliga starvsstovu, sum ger eitt stórt arbeiði at tryggja at matur, sum verður framleiddur her á landi ella innfluttur, ikki er eitraður eitt nú av salmonella ella øðrum smákyktum. Køkar skulu lúka strangar treytir um reinføri. Drekkivatn verður kontrollerað, dioxin í luftini verður mált. Sjógvurin verður kannaður. Øll fiskavirkir skulu lúka strangar treytir um reinføri.

Alt hetta fyri at minka vandan fyri eitran og heilsuskaða á tey, sum skulu eta matin ella anda luftina.

Heiluskaðilig evnir eru funnin í okkara grind og fiski, hetta verður sum nakað heilt nátúrligt tikið í stórsta álvara, tí heilsan hjá okkara børnum er hótt. Dygdargóð gransking hevur víst, at børn, sum t.d. hava kyksilvur í kroppinum, gerast eitt vet verri fyri heilsuliga og mentalt enn onnur børn. Tí verður ávarað ímóti at eta grind meira enn eitt ávíst tal av ferðum um vikuna, og fólk rætta seg sjálvandi eftir tí.

Á altjóða pallinum verður eisini nógv gjørt t.d. sáttmálar um hægstumørk fyri útlát av ymiskum evnum í nátúruna, um so er, at hesi teoretiskt kunnu hugsast at skaða umhvørvið. Koyoto avtalan er bara eitt dømi: Hvør minnist ikki sendingarnar av høsnarungum, sum komu til landið til eini jól. Har var funnin salmonella í onkrum unga, og tí var øll sendingin send aftur av landinum. Hvør minnist ikki, tá tær reyðu pylsurnar blivu gráar, tí at illgruni var um at litevnið, sum tá var brúkt, kanska kundi skaða brúkaran.

Eftir at illgruni varð reistur um at neytaøði møguliga kann hugsast at smitta menniskju og geva Creutzfeld-Jakob sjúkuna, var allur kjøtídnaðurin lagdur um, og tað bleiv bannað at nýta beinmjøl og heila/møn av neyti til mannaføði. Fleiri stjórnir ivast í um tað er rætt at loyva gen-manupuleraðum mati á marknaðin fyrr enn tað er 100% tryggja, at hann er óskaðiligur.

Alt gott um hesi fyribyrgjandi tiltøk og gransking, tey er neyðug, og tey gerast alt meira umfatandi og tey fyribrygjandi tiltøkini strangari.

### Tann stóri skógurin, sum ikki sæst fyri trøum

Her í Føroyum selja vit í hvørjum matvøruhandli og hvørjari kiosk eina nýtsluvøru, sum er so eitrandi, at hon drepur einar 80 føroyingar hvørt ár og ger eina rúgvu av fólki sjúk. Hon gevur frá sær eini 4000 evnir, sum eru direkta eitrandi. Talan er um sjálvgjørda dálking hjá teimum, sum roykja aktivt og innhalera roykin direkta niður í lunguni, og ósjálvvilja (passiva) dálking fyri restina av føroya fólki íroknað børn. Av teimum vanaroykjarum, sum roykja aktivt verður roknað við, at uml. 50% doyggja av roykingini og restin gerast meira ella minni sjúk. Ein passivur roykjari hevur uml. 30% øktan vanda fyri at fáa lungnakrabba, um hann býr saman við einum roykjara. Á arbeiðsplássum, har roykjarar og ikki-roykjarar sita saman, hevur ikki-roykjarin 19% øktan vanda fyri at fáa lungnakrabba. Deyðatilburðir av passivari royking svarar nøkulunda til talið av fólki, sum doyr í ferðsluni.

Í altjóða høpi verður roknað við, at í 90'unum doyðu einar 3 milliónir av fólki um árið av royking og, at hetta talið fer at økjast til 10 milliónir um árið í 2020'unum. Sum nú er verður roknað við, at í aldrusbólkinum 35 til 69 ár er uml. 3. hvør deyðatilburður hjá mannfólki elvdur av royking og teir, sum doyggja í hesum aldursbólkinum missa eini 22 ár av lívinum.

Roykingin er fremsta identifiserbara og modifiserbara orsøkin til sjúku og deyða í vesturheiminum og elvir til fleiri deyðatilburðir enn onnur dálking, vanlukkur (íroknað ferðsluvanlukkur), sjálvmorð, morð, alkoholmisnýtsla og narkotika **tilsamans**. Tað gleðiliga er, at hendan orsøkin kann fyribyrgjast ella heilt beinanst burtur, um vit vilja.

http://www.druglibrary.org/schaffer/tobacco/who-tobacco.htm

### Vanligi roykjarin roykir ikki av fríum vilja

Nikotin er at samanbera við heroin og kokain og er verri enn alkohol og hash, tá talan er um bundinskap. Flestu roykjarir angra, at tey nakrantíð byrjaðu at roykja, og tey royna at leggja av.

Av 100 roykjaum, sum royna at leggja av uttan hjálp, eru uml. 90% byrjaði at roykja aftur, tá 1 ár er farið. Um roykjarin fær hjálp (roykiavvenjingarskeið, medisinka viðgerð við tyggigummi, tablettum) so eru tað kortini 70 til 80%, sum byrja aftur at roykja eftir einum ári. Roykjarin identifiserar ofta seg sjálvan við tubakkið. Hetta vísir seg á tann hátt, at hann følir seg hóttan sum persón, tá talan er um at skerja ella burturbeina tubbakið; hann sigur at fyribyrgjararnir eru úti eftir at avskaffa seg (roykjaran), sjálvt um tað veruliga motivið jú er at forða fyri, at roykjarin avskaffar seg sjálvan. Fleiri hugsa at fyribyrgjararnir vilja ikki, at roykjarin skal "vera til" í samfelagnum, sjálvt um tað veruliga motivið jú er, at roykjarin skal vera millum okkum sum longst (sum eks-roykjari). Summi siga bart út, at tey vilja heldur doyggja enn at gevast at roykja; ella roykjarin gevur tilkennar ta vælkendu fatalistisku, resignerandi støðuna "vit skulu jú øll doyggja av onkrum" (við øðrum orðum, so kunnu vit líka so gott fáa tað skjótt yvirstaði og roykja okkum í hel). Sum verju reagerar hann ofta við sarkasmu, ironi ella svørtum humor, tá roynt verður at umrøða trupulleikan seriøst.

Bundinskapurin er so stórur, at royking í dag í læknaverðini verður roknað sum ein sjúka (á enskum addiction). Í altjóða diagnosu-skránni hjá WHO er nikotin-bundinskapur bólkaður samanvið heroin- og kokainnarkomani.

Hetta er ikki skrivað fyri at niðurmeta roykjaran á nakran hátt, hann er í veruleikanum tað óseka offrið í hesum spæli:

Roykjarin (80 - 90%) er byrjaður at roykja sum tannáringur, áðrenn hann hevði sítt vaksna skil og dømikraft. Hann er, sum omanfyri frágreitt, svert bundin av nikotininum og kann ikki lata vera við at keypa tubbak og roykja. Tað er hann, sum leggur kropp til at blíva sjúkur. Tað er hann, sum skal doyggja áðrenn tíðina (við 50% sannlíki) av roykingini. Ein steinur omaná byruna er so tað, at áðrenn tað kemur so vítt, hevur hann goldið eina rúgvu av peningi fyri tubbakið (hjá teimum flestu meira enn _ millión kr.).

### Royking og kvinnur, sum eru við barn

Eitt syrgiligt dømi um, hvussu turvelvandi nikotin er, er roykingin hjá gravidum kvinnum. Allar vilja sjálvandi teirra barni alt tað besta og ynskja sær sum nakað heilt sjálvfylgiligt eitt sunt og vælskapt barn. Tær fáa upplýsing frá lækna/jarðamóður um fylgirnar av royking. Hóast hetta vísa kanningar eitt nú í Bretlandi, at 70% av roykjarunum halda fram við at roykja, meðan tær ganga við barninum. Av teimum, sum leggja av beint áðrenn ella við byrjan av graviditetinum, byrja 19% at roykja aftur seinni

*Framhald á síðu 18*




